# Javnaðarflokkurin ger beint øvut av sínum yvirlýsingum

HØGNI HOYDAL



**Um Javnaðarflokkurin meinar nakað við sínum nýggja tosi um kapping til peningastovnarnar, kann hann beinanvegin broyta tað lógaruppskotið hann sjálvur hevur lagt á ting, sum tekur møguleikarnar frá Húsalánsgrunninum at veita kappingarføra sethúsafígging**

Í løtuni verða vit fóðrað gjøgnum pressuna við tómum politiskum vallyftum frá Javnaðarflokkinum. Í 6 ár hevur hann sitið við valdið, og Javnaðarflokkurin hevur miðvíst felt øll uppskot um at seta peningastovnunum krøv. Seinast var í mai mánaði, har hann afturvísti øllum uppskotum frá Tjóðveldi um at seta peningastovnum krøv um rentulækking í sambandi við bankapakka 2. Og í fleiri svarum til fyrispurningar frá undirritaða, hevur Jóannes Eidesgaard afturvíst at gera nakað við og seta politisk krøv til peningastovnarnar.

Áður enn tað, gav Javnaðarflokkurin stórar skattalættar til tey, ið ikki høvdu tørv á tí, lat arbeiðsmarknaðin aftur fyri arbeiðsmegi – og skapti harvið ta fíggjarligu støðu, ið vit í dag skulu stríðast við og tann bløðrubúskap, ið er atvoldin til fíggingarpolitikk bankanna. Harumframt framdi Javnaðarflokkurin serlóggávu, ið gav serligan rentufrádrátt til at lána pengar til partabrævakeyp. Og fyri minni enn einum ári síðani feldi hann uppskot frá Tjóðveldi, um at broyta tað aftur.

Nú er sjálvandi at gleðast um, at Javnaðarflokkurin tekur frástøðu frá øllum tí, hann hevur framt. Landsfundur Javnaðarfloksins krevur nú alternativa sethúsafígging, ið kann geva peningastovnunum kapping.

Men í seinasta mánaða legði Fíggjarmálaráðharrin uppskot fyri tingið, sum tekur møguleikan frá Húsalánsgrunninum at kappast við peningastovnarnar um sethúsafígging.

Javnaðarflokkurin kann tí beinanvegin vísa sína nýggju støðu í verki, og samana við andstøðuni taka stig til at broyta hetta lógaruppskotið soleiðis, at Húsalánsgrunnurin frameftir kann veita fullfíggjaða fígging til sethús og fastogn.

Ger hann ikki tað, kunnu vit endaliga sláa fast, at eisini her er talan bert er um tóm lyftir og royndir at látast í fjølmiðlunum – meðan ongin kannar samanhangin millum orð og gerðir.

# Bumba undir samstarv

KÁRI P. HØJGAARD
Sjálvstýrisflokkurin. Limur í tvørpolitiska eftirlønarbólkinum



**Verður landsfundarsamtykt Javnaðarfloksins ein bumba undir tvørpolitiska samstarvið um nýggja pensjónskipan?**

Í fundarsamtykt frá landsfundi Javnaðarfloksins verður sagt um Eftirlønarnýskipan.

Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri at fremja eina eftirlønarskipan, sum fleiri undanfarnar samgongur hava roynt (men ikki megnaðu, mín viðmerking).

Hví er alneyðugt at kunngera føroyingum, at tað verða fingramerki Javnaðarfloksins, sum mynda eina nýggja pensjónskipan, tá hendan verður viðgjørd tvørpolitiskt, og roynt verður at finna fram til eina felags semju sum allir flokkar javnbjóðis kunnu taka undir við?

Serliga óheppin er fráboðanin, nú fyrsti hoyringsfundur við arbeiðsmarknaðin og avarðandi partar er avtalaður at verða mánadagin.

# Hvar bleiv nýggi tunnilin millum Hvalba og Trongivág av?

NIELS OLAF EYVINDSSON



Eg minnist so væl at øll valevnini, ið bjóðaði seg fram, til løgtingsvalið í januar 2008, í Suðuroynni. Tað bleiv lovað, at nú skuldi tunnil gerast millum Hvalba og Tvøroyri. Tað bleiv avsett eitt sindur til forkanningar í 2009. Eg havi lagt til merkis, at kjarnuboringar hava verðið gjørdar, hetta kann sigast at verða langt til fjals, í Trongisvági. Heldur frægari sá út, tá borað var í Hvalba. Her var borað í niðara botni, ið sigast má verða skilaligt, sæð við flestu hvalbiareygum.

Men nú fíggjarætlanin fyri 2010 er til viðgerðar er ikki eitt einasta oyra avsett. Hetta kemur sera illa við hjá okkum, ið koyra í gjørnum elsta tunnil í danska kongaríkinum. Eitt sindur av viðlíkahaldsarbeiði av hesum tunnlinum var gjørt í vár. Tá eg skrivi eitt sindur, so er tað at smyrja tjúkt upp. Har vóru bert pengar til eitt lítla part av arbeiðinum. Tað blivu »skrótað« umleið 300 metrar. Har komu nógv tons av leysum gróti niður undan loftinum. Tað er ikki gott at vita, hvussu nógv 100 tons sita leys undir hinum 1000 metrunum at tunnli, ið ikki vórðu skrótað?

Hetta er so veruleikin vit liva í hvønn einasta dag. Men ein hevur so ábyrgdina av hesum. Spurningurin er bara, hvør er tað? Eg meti at tað eru fleiri, ið hava ábyrgdina av hesum. Fyrst er tað nokk Landsverk. Hareftir landstýrisfólkið, ið hevur ábyrgdina av hesum stovni. Hareftir koma so samgonga og samgonguleiðari. Eg hugsi, at samvitska er ikki nakað, ið hesi fólk liggja inni við.

Landsverk hevur á heimasíðu sínari ikki eitt orð um nýggjan tunnil til Hvalbiar. Tað er sera harmuligt at ein stovnur, hevur ábyrgdina av eini, í mínari verð, deyðfella, ikki hevur eina ætlan hvussu betrast kann um hesi viðurskiftini.

Mín spurningur er: Eru hvalbingar og suðringar gloymdir ella minnast tit bert til okkum tá val verður aftur?

Eitt er vist – hendir einki nú, so kunnu tit gloyma at koma við gyltum lyftum til næsta val.

Søgan um okkara tunnil er nakað soleiðis. Hann føddur í 1963 og var og er væl enn 1450 metur langur. Eittsporaður og við nøkrum smáum vánaligum steðgistøðum inni í tunlinum. Elsti tunnil í Føroyum. JA! Í kongaríkinum. Nógv ferðslan er í tunnlinum hvønn dag. Teir stóru bilarnir eru allir serbygdir ella bilar, ið víkja frá standard málum á stórum bilum, ið koyra á landsvegnum í Føroyum. Tað kemur meira enn so fyri, at farmur ikki sleppur gjøgnum tunnilin.

Men eitt eru vit sloppin undan higartil, tað er at eingin vanlukka er hend í tunlinum, men tann dag tá ein stór vanlukka hendir í tunlinum – tá verður ábyrgdin rætta móti viðkomandi ábyrgdara.

Tað er av alstórum týdningi at nýggjur tunnil verður gjørdur sum skjótast millum Hvalba og Trongisvág. Byrjast má sum skjótast upp á hetta arbeiði. Tað er einki minni enn ein sjálvfylgja at okkara 46 ára gamla farleið verður skift út við eina nýggja trygga og tíðarhóskandi farleið. Um ein hyggur at einum arbeiðsmanni, ið hevur arbeitt í 46 ár, tá er hann heilt nær við at fara av arbeiðsmarknaðinum.

Minnist eg rætt, so er Hvalbiar Kommuna – einasta kommuna í landinum, ið hevur goldið stóran part í tunlunum, ið eru millum Hvalba og Trongisvág og Hvalba og Sandvík!

Eg skilji væl, at onnur eisini vilja hava ajourført teirra farleiðir, men lat tað verða eftir einum ávísum mynstri, ið tekur teir elstu tunlarnir fyrst. Einki annað er sjálvsagt.

Vónandi lesur onkur hetta, ið hevur eitt orð at siga. Hvør kann og torir at siga, eitt orð.

# Eingin almenn kapping móti privatum

JÁKUP MIKKELSEN



Um tað er ætlanin hjá Rósu Samuelsen at stovna almenna ergoterapi fyri harvið at taka grundarlagið undan dýrtkeyptari privatari servitan, so verður tað uttan stuðul frá Fólkaflokkinum.

Vit hava í dag eina væl virkandi privata ergoterapeut fyritøkur, sum í góðum samstarvi við tað almenna eisini tekur sær av teimum uppgávum, sum umvegis lækna og Almannastovuna verða ávístar teimum.

Men meðan trendurin um allan heim gongur móti privatiseringum av almennum stovnum, tykist gongdin í Føroyum at vera júst hon øvugta. Her setur tað almenna nýggj virkisøki í gongd at kappast móti verandi privatum fyritøkum.

Hetta eru fyritøkur, sum gjøgnum tung og stríggin byrjunarár hava upparbeitt sær eina servitan á økinum, og so fer tað almenna inn í kappingina móti teimum privatu við øllum landskassanum í rygginum.

Summar av hesum fyritøkum hava bygt sítt virksemi upp uppá at nøkta ein tørv, sum tað almenna hevur, og tá landið so knappliga fer at seta sítt egna á stovn í kapping við tað privata merkir hetta, at ikki bert tann servitan, sum hesar fyritøkur hava upparbeitt gjøgnum árini í ringasta føri fer fyri skjeyti, men eisini øll tey sertól, sum eru neyðug í eitt nú ergoterapi viðgerð, og sum fyritøkur hava gjørt íløgur í, knappliga standa óvirknar.

Privatir ergoterapeutar viðgera í dag eini hundrað børn um vikuna, og er hetta ein týðandi partur av teirra virkisgrundarlagi. Tað kom tí sum ein hvøkkur, ikki bert hjá okkum politikarum, men so sanniliga eisini hjá privatu ergoterapeutunum, tá Rósa Samuelsen á Tingsins røðarapalli mikudagin boðaði frá, at hon hevði í kvittanum, at seta á stovn almenna egroterapi.

"If it ain't broke – don't fix it" verður sagt. Og eg fari at siga tað sama við Rósu Samuelsen.

Fólkaflokkurin hevur til alla tíð staðið sum hornasteinurin undir privata fyritaksseminum, og tað plagdi eisini at vera ein grundhugsjón hjá Sambandinum. Og sjálvt um sæð verður burtur frá hesum, gevur tað als onga meining at fara undir at byggja ein nýggjan almennan stovn upp, tá vit longu framman undan hava servitanina innan økið í privata sektorinum.

So míni ráð til Rósu Samuelsen eru, at lata vera við at pilka við nakað, sum virkar. Tí tað verður eingin almenn kapping sett á stovn móti tí privata við Fólkafloksins hjálp. Verður tikið um endan í onkrum av tí, sum ikki virkar nøktandi innan títt málsøki, so skulu vit nokk taka lógvatak saman við tær.

# Til Eir og Kringvarp Føroya

CHRISTIAN FRÓÐI DJURHUUS

**Hetta er ein takkarkvøða til Eir í Ólavstovu og Kringvarp Føroya**

Eir, margfaldar tøkkir fyri tíðina sum tú var her á Sambýlinum á Eysturstræti. Tú hevur broytt mítt andlit til útlit. Og eg eri sera fegin um at tú seinasta summar kom og vitjaði og gjørdi eina so góða sending um meg og mín næsta.

Tað vóru tvørstøður og minni tvørstøður, tað vil so vera. Men takk fyri at tú sum lýsti á meg og ikki bara meg men á støðu teirra, sum í somu støðu eru. Eg havi fingið so góð viðmæli sum einstaklingur, og við sendingini "Sterkur veikleiki," hevur tú varpað eitt so stórt ljós á støðu teirra sinnisveiku. Hetta, sum í føroyinginum liggur sum bralandi sjóðan í undirvitskuni. Enn eina ferð, túsund takk fyri.

*Mær tókti, at í tíðarvend*
*eg stóð*
*Og leit út yvir tindar, bjarg*
*og fjøll.*
*Ei nakrantíð, so tígnandi*
*eg vóð*
*Í minnum, sum av grundum*
*reistust øll.*

*Nú letur til, sum helmað*
*skjótt skal í,*
*Og sinnið søkkur syvjað,*
*ikki syrgt.*
*Mær vónin skal í brosum*
*sýnast blíð,*
*Um enn eg ikki havi um*
*tað yrkt.*